AD ASTRA
AN INFINITE UNIVERSE OF CREATIVITY

Enneagrammið, ger tað munandi lættari at:
- Síggja bjálkan í sínum egna eyga
- Taka í egnan barm
- Fyrigeva

Undirvísari:
Dorthe Gyldenkærne, lærari og sertificerað HR- Coach.

Børnum tørvar vaksin
ið eru medvitandi um sína egnu enneagramvangamynd






"To be able to help beings, whose needs and dispositions are so varied, it is necessary to resort to numerous and diverse methods.

Dalai Lama"

Sosialurin/KvR 34 18 00

Ad astra er partur av latínska orðatakinum »Per aspera ad astra«, sum merkir »Gjøgnum mótgongd til stjørnurnar«. Visiónin hjá Ad astra er at kunna hjálpa einstaklingum og fyritøkum at fáa atgongd til og gagnnýta óendaliga menniskjaliga tilfeingið til frama fyri okkum sjálvi og komandi ættarlið.

Norðuri á Heyggi 26 • 176 Velbastaður • info@adastra.fo • Tel. 211220/288090 • www.adastra.fo

# Børnum tørvar vaksin, ið eru medvitandi um sína egnu enneagramvangamynd



Dorthe Gyldenkærne

Børnum tørvar vaksin á ymiskum hátt. Umsorgan, nærleika, kærleika og virðing kunnu børn ongantíð fáa nóg mikið av. Fyri at kunna vísa komandi ættarliðum hetta, mugu vit vaksnu støðugt mennast sum menniskju og verða medvitandi um okkara ábyrgd sum 'rollemodell'. Børnum tørvar dagliga vaksin, ið duga tað, sum á enskum kallast "walk the talk". At orð og gerðir fylgjast.

Just sum vit kunnu strimbra børn við søgum, sangum og rørslum; kunnu vit stimbra børn við at hava stórt innlit í teirra verð. Ikki bara verðin sum fortelir um, at tey hoyra til hetta ella hatta slagið, diagnosi dittin og dattin, men teirra heilt individuellau verð. Ein treyt fyri at kunnu respektera barnið fult út og vísa virðing, er at kunnu virða og respektera seg sjálva sum vaksin.

Men kunnu vit vaksnu respektera og viðurkenna okkum sjálv og okkara skuggasíður? Tað er ein spurningur, sum vit kunnu seta okkum sjálv hvønn einasta dag. Enneagrammið er eitt samskiftis- og menningaramboð, ið kann prika til okkara skuggasíður, fáa veikleikar vent til styrkir og harvið lættari atgongdina til "walk the talk".

Enneagrammið kann brúkast í gerandisdegnum úr barnahædd til toppleiðaristøði. Barnið sjálvt kann frá seinni helvtin av konkreta operationella aldrinum, t.v.s. umleið 10 ár gamalt, byrja at skilja bæði egnu enneagram-vangamynd og vangamyndina hjá javnaldrandi sum verandi ein týðandi partur av persóns-menskuni. Og tá ið børnini verður tannáringar er prógv fyri, at enneagrammið kann brúkast til bæði sálarliga og andaliga menning.

Vinnulívið og topleiðarar hava eisini tikið enneagrammið til sín. Professor Michael Ray, Stanford Business School kann endurgevast fyri at siga: *"The Enneagram is one of the most efficient and human systems for reaching the compassion and leadership needed in business today"*. Og til stuttleika kann nevnast, at toppleiðarin hjá LEGO hevur úttalað at, hann ongantíð hevur lært so nógv um leiðslu, sum tá ið hann arbeiddi í einum barnagarði. So um øll starvsfólk í dagstovnum og skúlum eisini fáa enneagrammið inn undir húðina, fer verðin kanska so við og við at verða eitt øðrvísi og betri stað at liva. Eitt stað har orð og gerðir ganga hond í hond til frama fyri heildina.

Á Pedagogisk forum verður møguligt at fáa innlit í, hvussu ein arbeiðir við enneagramminum. Til teirra, sum rættiligt hava hug at fáa enneagrammið inn undir húðina og læra enn meira, kunnu taka eina moduluppbygda enneagramútbúgving her í Føroyum. Higartil hevur modul 1 út av 4 verið tvær ferðir. Útbúgvingina fer fram í samstarvi millum Synergi og Ad astra.

Skrivað hevur: Dorthe Gyldenkærne, lærari og sertifiserað HR-Coach.